

# Sangkappingin

*Tíðindaskriv frá Føroya Sanglærarafelag*

Tíðliga í summar bjóðaði Føroya Sanglærarafelag til kapping um at gera nýggjar sangir til komandi skúlasangbók.

Nakrir sangir eru longu komnir inn, men stigtakararnir vóna, at nógv uppskot fara koma afturat.

Freistin at senda sangir inn er 20. august í ár, so enn er nakað av tíð til at luttaka.

Stigtakararnir heita á fólk um at vera við til at mynda komandi skúlasangbókina og kanska at vinna ein av stóru vinningunum. Um treytirnar og vinningarnar kann ein lesa á heimasíðuni www.skulasangbokin.fo

†

## Andlát og jarðarferðir

**John Coulthard,** fyrrverandi kommunulækni í Havn, andaðist á Aarhus sjúkrahúsi sunnudagin, 87 ára gamal. Jarðarferðin verður frá Hornbeck kirkju leygardagin klokkan 13.00.

**Gunver von Jessen,** fødd Zachariasen, vanliga nevnd Dyssa, andaðist fríggjadagin 1. august í Nivå, 78 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Nivå kirkju fríggjadagin 8. august klokkan 15.00.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá okkara góða mamma, vermóðir, omma, langomma og oldurommma

**Margrethe Egholm**

varð jarðað.

Tøkk til Bjarna Bæk, fyri tey góðu orð.

Tøkk fyri blómur og heilsanir, og tøkk øll tit, ið fylgdu henni.

Ein stór tøkk til Lágargarð, og serliga til starvsfólkið á Miðstovuni, ið vóru so góð við hana og okkum avvarðandi í tey 11 árini, hon búði har.

*Familjunnar vegna*

**Jens Petur, Petur og Hanna**

# Er Gerhard ein hetja?

KAI VÁGFJALL
kv@olivant.fo



Hendan morgunin, eg lurtaði eftir sendingini Summarmorgun í ÚF, har Gerhard Lognberg varð móttikin sum ein hetja á kajuni í Skopun, hugsaði eg við mær sjálvum, hvat snýr alt hetta hóvastákið og øsingin seg um?? Har vóru róp og skrál, lovprísan, fyri ikki at siga tilbiðjan og dyrkan av einum persóni, sum hevði lovað teimum nógv, men í roynd og veru, als einki hevur megnað at givið teimum, uttan bara tóm orð og tóm lyftir.

**Falskar vónir**

Undan valinum, gav hann sandoyingum lyfti um, at hann skuldi geva teimum ein undirsjóvartunnil, millum Suðurstreymoynna og Sandoynna. Eisini tá var Gerhard móttikin sum ein hetja, við røðum, róp og skrál, men tað sum hann átti at havt syrgdi fyri, var at fáa til vega fígging, men hetta varð als ikki hugsa um. Hjá Gerhardi ráddi tað bara um eitt, og tað var at verða afturvaldur, so vertin á, at hann gav sínum veljarum falskar vónir og tóm lyftir.

**Eysturoyartunnilin fyrstur**

Í svarinum, sum løgmaður gav Gerhardi, sigur hann m.a., at Eysturoyartunnilin helst verður gjørdur fyrst. Hetta fall ikki í góða jørð hjá Gerhardi. Men tað løgna er nú, at Gerhard er, saman vi andstøðuni, í holt við at leggja uppskot fram í tinginum um, at Eysturoyartunnilin skal gerast fyrst. So hvør hevur svikið hvønn, haldi eg at føroya fólk dugur sjálvt at gera sínar metingar um. Um sandoyingar hava skilt hetta, veit eg ikki.

Hendan samgongan gav greið boð um, sambært tunnilsbólkinum, at farðast skuldi í holt við at borða Sandoyartunnilin, so skjótt játtanin var komin upp á 150 mill. kr, men takka veri skilaleysa atburðinum hjá Gerhardi Lognberg, er Sandoyartunnilin helst skotin langt út í framtíðina. Nær sandoyingar vakna veit eg ikki, men løgið er, at sandoyingar ikki duga at síggja, at við slíkari framferð, fæst einki fast samband við meginøki, sum landið liggur í løtuni.

**Nógv eru ivasom**

Sjálvur havi eg veri heitur fyrispurákari fyri, at Sandoyggin skuldi fáa fast samband, men eftir alla hesa høpisleysa øsing og skilaleysu, ódemokratisku framferð hjá Gerhardi, har hann hevur koyrt alt landið út í, so at siga stjórnarloysi, sum alt landið má bløða fyri, eri eg vorðin sera ivasamur, og tað eru tað eisini mong onnur, sum eru tað við mær. So sum fíggjarliga støðan er í løtuni, ger tað sjálvandi ikki betur.

At enda skal eg takka himum tingmanninim fyri Sandoynna, Páll á Reynatúgvu, sum hevur víst ein sera skilagóðan og virðiligan atburð í hesum máli, sum helst fer at løna seg aftur í síðsta endanum.

# Størsta ítróttarbragd í Føroya søgu og 50 metra svimjihyl

KRISTIN MICHELSEN
borgarstjóri
Vegna Tvøroyrar býráð



Fyrst vil jeg vegna Tvøroyrar býráð ynskja tær Pál Joensen hjartaliga tilukku við 3 falda Europameistaraskapinum, somuleiðis venjara tínum Jón Bjarnarsyni, SUSVIM, foreldrum, systkjum og ommuni í Vági, hetta er størsta ítróttarbragd í Føroya søgu, sum vábingar, suðringar og øll tjóðin kunnu verða stolt av.

Størsta ynski frá øllum, ið vara av svimjing í Føroyum hevur verið at fáa ein 50 metra svimjihyl, her vil jeg vegna Tvøroyrar býráð upplýsa at ogur hava í fleiri ár arbeitt vi 9ð at byggja ein 50 metra svimjihyl, og var eisini fíggjing fingin til hesa ætlan, men Føroya Landsstýri, ið sat í síðstu seti kláraði ikki avgreiða málið, hevði Føroya Landsstýri givið Tvøroyrar býráð loyvið, so hevði 50 metra hylurin verði komin væl ávegis ídag. Men Tvøroyrar býráð hevur tó ikki slept ætlani, men her má Føroya Landsstýri spæla við. Latum okkum leggja 50 metra svimjihylin í Suðuroy.